# Merkisdagar



## Gullbrúdleyp
Fríggjadagin 27. mai hava vit Dora Várlíð og Eivind Fróði Jacobsen, Sørvágur, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin í missiónshúsinum í Sørvági kl: 19:00. Tey ið ynskja at gleðast saman við okkum henda dagin, verða vinarliga biðin um at siga frá innan sunnudagin 15. mai á tlf 33 21 33 ella 28 63 69.



## Brúdleyp
Leygardagin 14. mai skulu vit giftast. Anja Klæmintsdóttir úr Norðragøtu og Sam Jacobsen úr Syðrugøtu. Vígslan verður í Gøtu Kirkju kl. 13.00. Tað verður boði til døgurða og vælkomst kl. 21.00 í Bygdarhúsinum í Leirvík.

## Diamantbrúdleyp
Fríggjadagin 20. mai 2011 kunnu hjúnini Esther og Eivind
Petersen, Oyndarfjørður hátíðarhalda 60 ára brúdleypsdag. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 17. Tey, ið vilja gleða okkum við at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 444529 ella 444501 innan 13. mai.

## Gullbrúdleyp
Týsdagin 10. mai er gullbrúðleypsdagur hjá Jónu og Jákup Lindenskov. Dagurin verður hildin á Hotel Føroyum frá klokkan 17.30, og øll eru hjartaliga vælkomin.

## Silvurbrúdleyp
Fríggjadagin 10. juni halda vit bæði. Sonlis og Tummas Eli Høj Joensen, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Kelduni í Skalabotni frá kl 18.00. Tey, ið vilja gleða okkum við at halda dagin saman við okkum, verða vinarliga biðin um, at siga frá innan 3. juni á tlf. 749451 ella á telduposti: tehj@kallnet

## Brúdleyp
Leygardagin 11.juni 2011 giftast Malan Ludvig, Tórshavn og Dávur Brøðraberg, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, og nátturði verður í Sjóndeplinum í Tórshavn frá kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 251008 (Malan) ella á tlf. 215060 (Dávur) innan 15. mai 2011.

## 60 ára føðingardagur
16. mai fyllir Jórun Thomsen, Sumba, 60 ár. Dagurin verður hildin heima leygardagin 21. mai frá kl. 15.

## Ferming
Sunnudagin 15. mai verður Helena H. Glyvradal, dóttir Anniku H. og Jákup Glyvradal, fermd í Tersløse kirkju.

# Tøkk




## Tøkk
Vit takka hjartaliga øllum tykkum, sum gleddust saman við okkum á gullbrúdleypsdegnum. Takk fyri morgunsang, blómur, gávur og heilsanir. Takk til Regin, sum leiddi borðhaldið, til Jónsvein og Jón, ið leiddu sangin, og til Tórhild og Evu fyri vakran sang. Elin fær eisini eina tøkk. Eisini takk til tykkum í Bygdarhúsinum fyri góðan mat og góða tænastu. Til síðst, men ikki minst, vilja vit takka børnum og svigarbørnum fyri alla hjálp, vit fingu í sambandi við dagin. Hjartaliga takk øll somul.
*Heilsan*
**Mia og Joen Magnus (Helli)**

# Tiltøk

Nøkur pláss eru eftir, og fólk úr øðrum feløgum eru vælkomin við.
Luttakarir tekna seg skjótast gjørligt hjá einum av nevndarlimunum, telefon 311756, 228138, 210621, 213244 ella 222733.
Nevndin

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
tlf. 316491/286491
Teldupostur: tilhald@torshavn.fo
Drekka er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks
Túrur:
Mikudagin 18. mai kl. 8.30 verður farið úr Havn til Suðuroyar. Við bussi til Sumbiar, frásøgumaður verður Eli Poulsen. Døgurði í Øravíka. Áðrenn farið verður til Sandvíkar. Av Tvøroyri kl. 18.30. Hittast umborð á Smyrli kl. 8.30. Flóvin Jacobsen og harmonikan verða við á túrinum.
Tilmelding: 316491.
Kostnaður 380,- (íroknað ferðing, bussur, døgurði og frásøgufólk). Gjaldast í seinasta lagi mánadagin 16. mai.
Týsdagur 10. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið opið
10.00 Vit syngja. Victor Carlsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
14.00 - 16.00 Prát
Mikudagur 11. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið opið
09.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð
13.00 Bindiklubbur
15.00 Túrur
Hósdagur 12. mai
09.00 - 16.00 Motiónsrúmið er opið
10.00Fimleikur kvinnur, Grete Ellingsgaard
14.00 - 16.00 Prát
Fríggjadagur 13. mai
09.00- 16.00 Motiónsrúmið er opið
09.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð
14.00 - 16.00 Prát
*Frá 1. mai verður Tilhaldið opið frá 09.00 – 16.00*

**BERIN**
Til børn og ung, ið hava mist foreldur ella systkin. Vit byrja nýggjar bólkar í Beranum í februar. Áhuga eru vælkomin at ringja til á tlf. 222993 ella maila til info@berin.fo.
www.berin.fo

**Føroyskt Bretskt Felag haft aðalfund**
Hesi eru í nevndini:
Knút Gray nyvaldur, Fanny Joensen, Merry Southerland Stenberg, Eyrith Guttesen Leyni og Anna Katrina Viderø. Nevndin skipaði seg við Knút Gray sum formanni.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Limirnir hittast í Losjuni.
Mikudagin 30. mars kl. 18 hevur felagið bingo í Losjuni.

**Samuelskirkjuni**
Tað er guðstænastur:
15. mei kl. 14 - 5. juni kl. 14
19. juni kl. 14.

**Á Hvítusunnu byrjar summartíðin á Listasavninum**
Listasavnið á Sandi er opið hvønn sunnudag kl. 14-16, men vert er at hugsa um, at skúlaflokkar, virki og onnur sum koma í Sandoynna hava høvi at vitja Listasavnið á Sandi eftir avtalu á tlf. 211924 ella 361617.
Vinaliga ringið í góðari tíð, so vit finna ta tíðina, sum passar tykkum og savninum best.
Á Hvítusunnu byrjar summartíðin á Listasavninum. Tá er opið allar dagar uttan mánadagar kl.14-16.
Atgongugjaldið er kr.50

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Calarasi Missiónin**
Hjálp okkum at geva svongum børnum í Romenien eina heita máltíð um dagin. Konto í Eik: 9181 4252669
Bank Nordic: 6460 1618549
Takk fyri tín stuðul.

**Frítíðarfelagið Antares**
Áhugafelag hvørs endamál er at skapa samanhald og røkja áhugamál hjá teimum føroyingum, sum starvast í altjóða farma- og frálandavinnu. Vitja heimasíðu okkara á www.antares.fo ella send ein teldupost til antares.njordur@gmail.com, fyri at fáa meira at vita um felagið.

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.